Vikuskiftis Sosialurin



# Kuldamet í ár

**Tíðarskeiðið 19. desember til 7. januar hevur verið tað kaldasta í Føroyum seinastu 50 árini. Hetta sigur Alix Rasmussen, veðurfrøðingur á DMI, sum hevur kagað í veðurhagtøl fyri Sosialin**

VEÐRIÐ

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Við einum miðalhita upp á 0,6 stig er kuldin seinastu vikurnar tann ringasti, sum hevur verið seinastu 50 árini í Føroyum. Næstkaldast var sama tíðarskeið í 1995 við 0,8 stigum.

Hesar seinastu 20 dagarnar hevur kavin ligið um so at siga alt landið. Hóast hitastig, hevur kavin verið beinfrystur, at hann hevur verið liggjandi.

Í londunum kring okkum hevur eisini verið óvanliga kalt, og kuldin heldur fram í eitt nú Danmark.

- Komandi vikuna bráðnar kavin í Føroyum. Men í fjøllunum verður hann liggjandi, sigur Alix Rasmussen, veðurfrøðingur.



*Tað eru nógv ár síðan, at kavin hevur ligið so leingi sum í ár.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Veturin 1978/79 lá kavin frá síðst í desember til miðjan februar*




*Veturin 2002/03 var næstan ongin kavi*

## Kaldast í 2009

Tíðarskeiðið 19. desember til 7. januar hevur miðalhitin verið hesin:

**Kaldastu trý árini:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | 2009 | 0,6 |
| 2 | 1995 | 0,8 |
| 3 | 1968 | 1,2 |

**Heitastu trý árini:**

| | | |
|---|---|---|
| 48 | 1997 | 6,1 |
| 49 | 1972 | 6,7 |
| 50 | 2006 | 7,2 |

Hagtøl: Alix Rasmussen, DMI

vindeygu hurðar klædningur ... www.import.fo

Nøgd, snið og støðd eftir tygara ynski, einki standard



# Vindeygu úr kjarnutræ
– træ fyri lívið!

Vit hava nokk øll undrast yvir t.d. teir gomlu bygningarnar úti í Tinganesi, og tær gomlu træ kirkjurnar. Nógvir av hesum bygningunum eru fleiri hundrað ára gamlir. Viðurin stendur ár eftir ár, uttan at tíðin setir síni spor. Einki rot, tí tað høga kjarnuinnihaldið í viðinum forðar fyri, at tílíkt kann grógva í viðinum. Her er talan um kjarnutræ!

Framleiðarar av vindeygum við 90-100% kjarnutræi eru skrásettir undir »2 øko-ordningen« hjá Dansk Vindue Certificering (DVC). Strangasta góðkenning í vindeygavinnuni.

»Øko« er stytting fyri økologisk, tí hesin viður nýtist ikki aðra viðgerð sum t.d. impregnering. Viðurin er 100% gjøgnum viðgjørdur frá náttúruni.

**Træ vindeyguni og hurðarnar hjá Sp/f Import.fo hava øll:**
• Minst 95 % kjarnutræ innan og 100 % uttan. • Framleiðara ið er skrásettur undir 2 øko-ordningen hjá Dansk Vindue Certificering (DVC). • Spegilsskorið og límað kjarnutræ. • ISO 9001 góðkenda framleiðslu.
• Bakfestar glaslistar og síðani fugað við hond, innan og uttan. T.v.s. ongir sjónligir seymir, ið kunnu rusta.




Import v/Toni Dam
Postboks 3070
Skótarók 3
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 321 521
Fax +298 321 421
import@import.fo

Opið er:
mán - frí kl. 08.00 - 16.30
Annars eftir avtalu

import.fo

Sosialurin 341800